## Notat um eftirløn til tímaløntar heima-/heilsuhjálparar

Í sáttmálanum fyri heima-/heilsuhjálparar millum Fíggjarmálaráðið og Heilsuhjálparafelag Føroya 2013 – 2015 er soljóðandi áseting um eftirløn:

**§ 11. Eftirløn**

Fyri heima-/heilsuhjálparar, ið settir eru eftir sáttmála millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið, skal verða rindað eftirlønargjald av løn sambært setanarbrøki og fyri meirtímar (tó ikki viðbøtur o.l.), treytað av at viðkomandi hevur verið í starvi í minst 1 ár, og miðaltímatalið er 15 tímar ella meira.

**Stk. 2. Eftirlønargjald**

Fyri tímaløntar heima-/heilsuhjálparar, ið arbeiða minni enn 15 tímar um vikuna í miðal um árið, verður ikki goldið eftirlønargjald.
Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjaldið.
Upphæddin fer í eftirlønarskipan, sum partarnir gera serstaka semju um.
Fyri tey yvir 60 ár - ella sum vegna heilsu - ikki kunna koma í eftirlønarskipanina, gera partarnir eina uppsparingarskipan ella líknandi.

Eftir hesi áseting um eftirløn, skal ein tímaløntur heima-/heilsuhjálpari arbeiða, í miðal 15 tímar um vikuna í eitt ár t.v.s. minst 780 tímar, áðrenn viðkomandi hevur rætt til eftirløn. Samstundis inniber henda skipan, at hvønn mánað, sum heima-/heilsuhjálpari fær løn útgoldna, má løntakarin, sambært lóg um eftirløn, gjalda 2 % (2% er galdandi fyri 2016, væntandi verður hetta broytt til 3 % í 2017, 4 % í 2018 osv. upptil 15 %) av egnari løn í eftirlønargrunn. Um so er, at løntakarin við ársendan hevur arbeitt 780 tímar ella meira, skal arbeiðsgevarin gjalda 15% í eftirløn av allari árslønini. Tilsamans verður tískil goldið 17 % í eftirløn í 2016.

Í nýggja sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Heilsuhjálparafelag Føroya 2015 – 2017 er ásetingin um eftirløn broytt, sum víst niðanfyri:

**§ 12 um eftirløn verður soljóðandi**

Fyri heima-/heilsuhjálparar, ið settir eru eftir sáttmála millum Heilsuhjálparafelag Føroya og

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, skal verða rindað eftirlønargjald 15% av løn sambært setanarbrøki og fyri meirtímar upp til fulla tíð (tó ikki fyri viðbøtur o.l.).
Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjaldið.

**Stk. 2.**
Fyri tímaløntar heima-/heilsuhjálparar, ið arbeiða færri enn 59 tímar um mánaðin, verður ikki goldið eftirlønargjald.

**Stk. 3.**
Heima-/heilsuhjálparar, sum eru føddir áðrenn 01.01.1954, avgera sjálvir, um eftirlønargjaldið skal flytast í eina eftirlønarskipan ella útgjaldast teimum, sum løn.

"Broytingin av eftirlønini hjá tímaløntum heima-/heilsuhjálparum hevur við sær, at tímaløntir heima-/heilsuhjálparar framyvir hava rætt til eftirløn, tá teir hava arbeiða minst 59 tímar í einum útgjaldsskeiði (útgjaldsskeiðið kann antin ganga frá 1. til 1. í einum mánað ella frá 15. til 15. í einum mánað).
Hetta hevur við sær, at heima-/heilsuhjálparar, ið arbeiða 59 tímar í einum útgjaldstíðarskeiði framyvir koma at fáa útgoldið eftirløn saman við vanligu mánaðarlønini, og ikki sum áður síðst í árinum, eftir at samlaða tímatali fyri ári er gjørt upp.
Tey útgjaldstíðarskeið, ið tímaløntur heima-/heilsuhjálpari ikki arbeiðir minst 59 tímar, hevur viðkomandi ikki rætt til eftirløn frá arbeiðsgevara sínum, tó má heima-/heilsuhjálpari, sambært lóg um eftirløn, sjálvur í 2016 gjalda 2 % í eftirløn.
Tá eftirløn verður flutt til eftirlønarveitaran, tá skal tað framganga, hvørjar veitingar eru fyri tímaløntar heima-/ heilsuhjálparar – og hvørjar veitingar eru fyri fastløntar heima-/ heilsuhjálparar.
***Nýggja skipanin um eftirløn kemur í gildi 1. januar 2017*".**

Fyrimunurin við nýggju skipanini er, at løn og eftirløn fella til gjaldingar um somu tíð. Vansin við nýggju skipanini er, at onkur einstakur heima-/heilsuhjálpari møguliga kemur at missa rætt til nakað av eftirløn. Orsøkin til at onkur kann missa nakað av eftirløn, kemst av, at ein heima-/heilsuhjálpari møguliga arbeiðir sera nógvar tímar nakrar mánaðir - og minni enn 59 tímar aðrar mánaðir, men at hesin við ársenda hevur eitt tímatal, sum kemur upp um 780 tímar. Eftir gomlu skipanini hevði hesin heima-/heilsuhjálpari fingið eftirløn fyri alt ári, meðan viðkomandi, eftir nýggju skipanini,

einans fær fulla eftirløn fyri tey útgjaldstíðarskeið, sum viðkomandi arbeiðir minst 59 tímar. Hinvegin, so skulu heima-/heilsuhjálparar sjálvir gjalda fyri egna eftirløn 2 % (2016), fyri teir mánaðir, ið hesir arbeiða førri enn 59 tímar um mánaðin.

Tórshavn tann 14. oktober 2016

Heilsuhjálparafelag Føroya

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið